TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Reglugerð fyri parkeringsloyvi til íbúgvar í parkeringsøkinum í miðbýnum í Tórshavn

Sambært Parkeringspolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu frá 2015 og býráðssamtyktum frá 30. mars 2017, 22. november 2018 og 28. oktober 2021 er tað møguligt hjá privatum íbúgvum at søkja um parkeringsloyvi móti gjaldi. Í hesum sambandi er eisini samtykt, at allur miðbýurin er eitt parkeringsøki.

**Umsóknir:**

1. Snarskivan í Tórshavnar kommunu avgreiðir umsóknir um parkeringsloyvi.
2. Søkjast kann um parkeringsloyvi á Vanganum, á torshavn.fo og í Snarskivuni, Vaglið, 100 Tórshavn. Tekniska fyrisiting viðger umsóknirnar.
3. Tann, ið søkir um parkeringsloyvi, skal upplýsa navn, p-tal, bústað og matrikkulnummar á bústaði sínum, og *møguligt samtykki um at fáa parkeringsloyvi frá persóninum, sum eigur ognina.

**Treytir:**

1. Umsøkjarin skal vera privatpersónur og skal hava bústað í parkeringsøkinum í miðbýnum (innan fyri parkeringsøki, sí kort), og bústaðurin skal ikki hava parkeringsmøguleikar. Kann parkeringspláss verða gjørt á ognini fyri <50.000 kr., verður umsóknin ikki gingin á møti.



2. *Eigur umsøkjarin ikki bústaðin, skal hann hava samtykki frá eigaranum at søkja um parkeringsloyvi.
3. Umsøkjarin skal eiga bilin, sum hann søkir parkeringsloyvi til, og bilurin skal vera skrásettur á bústaðnum, og skal hava føroyst nummarspjaldur.
4. Parkeringsloyvi verður bert latið privatum persónbili og tí ikki fyritøkubilum, motorsúkklum, lendisakførum, leigubilum og bilum tyngri enn 3500 kg.
5. Bert eitt parkeringsloyvi verður latið hvørjum bústaði.
6. Parkeringsloyvini eru galdandi í parkeringsøkinum í miðbýnum, sum er býtt upp í 5 parkeringsloyvisøki. Økini hava fimm ymiskar litir: Gult øki (1), Grønt øki (2) og Blátt øki (3), Orange øki (4), Lilla øki (5). Parkeringsloyvið er galdandi nærindis bústaðnum hjá loyvishavaranum í einum øki og heimilar viðkomandi at parkera í óavmarkaða tíð á flestøllum parkeringsbásum í ásetta øki við tíðaravmarkingunum 2t ella 8t, tá ið annað ikki er tilskilað. Frá 15. mai 2018 varð ein 1 ára royndartíð, har ávísir loyvishavarar í øki 1 fingu rættindi til at brúka parkeringsloyvi á ávísum parkeringsbásum við tíðaravmarkingini 30 min. Henda royndartíð er síðani longd til parkeringspolitikkurin væntandi verður dagførdur komandi ár, ella í síðsta lagi í oktober 2022.
7. Umsøkjarin fær nágreiniliga kunning um, hvar hann kann brúka parkeringsloyvið, sí nærri lýsing niðanfyri.
   **Undantøk:** Í einstøkum førum er frámerkt við parkeringsøkið: **Parkeringsloyvi ikki galdandi.**

   Soleiðis eru loyvisøkini í miðbýnum býtt upp:



8. Loyvishavarar, sum lúka treytirnar fyri at fáa parkeringsloyvi, fáa eitt kort, sum verður sett sjónligt niðast í høgru síðu á innaru síðu við forrútin í bilinum.
9. Parkeringsloyvið gevur ikki atgongd til ein ávísan parkeringsbás.
10. Eingin trygd verður veitt fyri, at parkeringsbásur er tøkur.
11. Akfør við parkeringskorti til rørslutarnað fáa ikki parkeringsloyvi. Hetta tí parkeringspláss til rørslutarnað hava onnur rættindi sambært aðrari lóggávu.

**Kostnaður:**
1. Parkeringsloyvið kostar 780 kr. um árið.
2. Mánaðargjaldið er 65 kr.
3. Parkeringsloyvið er galdandi frá 1. januar til 31. desember
4. Kostnaður fyri nýtt parkeringsloyvi í sambandi við broyttan bústað ella nýggjan bil er 100 kr.
5. Rindaða gjaldið verður ikki afturgoldið, verður kortið latið innaftur.

**Skyldur loyvishavarans:**
1. Íbúgvar, sum hava fingið játtað parkeringsloyvi, fáa heitið loyvishavarar.
2. Flytur loyvishavari úr parkeringsøkinum, ella eigur hann ikki longur bilin, er parkeringsloyvið ikki longur galdandi og verður latið Snarskivuni aftur.
3. Skiftir loyvishavari bilin út, skal hann biðja um nýtt parkeringsloyvi.
4. Skiftir loyvishavari bústað í parkeringsøkinum, skal hann boða Snarskivuni frá flytingini. Síðani verður kannað, um loyvishavarin framhaldandi hevur rætt til parkeringsloyvi, og hvat øki hann hoyrir til.
5. Verður parkeringsloyvi misnýtt, verður tað tikið aftur, og noktað kann verða fyri endurbílegging.
6. Loyvishavari hevur ábyrgd av, at parkeringsloyvi er galdandi.
7. Tað eru parkeringsansarar, sum kanna, hvørt parkeringsloyvi er galdandi.
8. Loyvishavari hevur skyldu til at halda seg dagførdan um, hvar loyvini eru galdandi.
9. Loyvishavari fær áminning um at endurnýggja parkeringsloyvi fyri ársskiftið.

Tórshavnar kommuna, 2. mai 2017

Dagført 28. oktober 2021